# Ingibjørg er uppvaksin saman við sparikassanum

**Vit hava verið á gátt hjá teirri 86 ára gomlu Ingibjørg Nicolajsen. Sigast kann næstan, at hon hevur fingið sparikassan inn við móðurmjólkini**



*Mynd av Ingibjørg á 175 ára móttøkuni hjá Eik í august í fjør*

## Kvinnumynd



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Sigast kann, at Ingibjørg er av góðum bergi brotin úti á Kirkju. Langabbin var Zacharias Mikkelsen, sum gekk í skúla í Havn, og hvørs framúr góða ummæli prýðir umslagið hjá Tórshavnar Skúlasøgu. Hann gjørdist seinni lærari á Kirkju. Frá honum stava tær kendu Sørensen og Zachariassen ættirnar úr Fugloy. Abbi Ingibjørg var Símun Mikael Zachariassen, sum verður roknaður sum ein av okkara fremstu mentamonnum. Serliga við sínum yrkingum. Hann var lærari í 42 ár í Fugloy og Svínoy, og hann var eisini í fremstu røð í fráhaldsørsluni saman við Absalon Guttormson á Trøllanesi.

Pápi Ingibjørg var Símun Petur Zachariassen. Hann var føddur í 1887. Símun Petur fór ungur á háskúlan í Føgrulíð, og í 1905 fór hann á læraraskúla. Aftaná fór hann til Danmarkar at nema sær meira kunnleika, serliga í fremmandum máli. Í 1914 gjørdist hann lærari í Klaksvík og hetta starv hevði hann til 1953. Tá ið hann byrjaði sum lærari var hann sjálvur annar lærari í Klaksvík.

Símun Petur giftist í 1918 við Mariu f. Henriksen av Dalinum í Uppsølum úr Klaksvík.Tey fingu sjey børn: Ása, Torgerð, Ingibjørg, Malan, Rannvá, Álvur og Jórun.

Símun Petur var løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin fyrst árini 1928-1943 og síðan 1946-1956.

Men afturat hesum var hann ein av leiðandi monnunum í Norðoya Sparikassa, sum hann var við til at stovna í 1919. Her var hann í leiðsluni frá 1919-1976, ella í samfull 57 ár.

Fyrstu árini var eingin beinleiðis stjóri. Tummas Juel Petersen var bókhaldari, og Símun Petur var kassameistari. Umframt teir skiftust hinir tríggir stjórnarlimirnir at møta upp sparikassadagar, so tað altið vóru tríggir til staðar, tá ið avgreiðsla fór fram. Í 1938 fekk sparikassin stjóra, og hetta gjørdist Símun Petur (fram til 1976) saman við J.F. Kjølbro (fram til 1951).

Símun Petur var fyrsti blaðstjóri á Norðlýsinum. Umframt alt hetta var hann eisini kommunuskrivari og eisini formaður í kommunustýrinum 1930-1934.

### Byrjaði 12 ára gomul í sparikassanum

Sparikassin kom at vera ein partur av lívinum hjá Ingibjørg frá byrjan av. Hon kom longu sum 12 ára gomul at hjálpa til í sparikassanum. Virksemið var tó ikki so umfatandi sum nú. Tá var eingin í fulltíðarstarvi, meðan tey í dag eru yvir 50! Opið var mikuog leygarkvøld kl. 5 til 7. Hetta var jú aftaná arbeiðstíð, og tí var hetta frægasta tíðin at hava opið.

Hetta hevur verið um 1934, og tá var sera avmarkað við tøkni. Men óhjálpin vóru tey kortini ikki. Ingibjørg hevði til uppgávu at rokna rentur út. Hetta var gjørt við eini tabell. Her kundi rentan síggjast fyri hvørjar 50 kr, sum stóðu inni. Hvørja ferð ein flyting var á kontoini, kundi síggjast á tabellini, hvussu stór rentan



*Norðoya Sparikassi. Hetta er fyrsti bygningurin frá 1928*



*Símun Michael Zachariassen saman við sínum synum. Frá vinstru Louis, kendur tingmaður fyri sjálvstýrisflokkin, Símun Petur, Símun Michael, Zacharias og Jógvan, amtslækni. Jógvan var ein av stovnarunum av Norðoya Sparikassa. Hann var grannskoðari og eftirlitslimur í fleiri ár. Beiggi Símun Michael, Søren Pram, var eisini ein stovnari av sparikassanum. Símun Petur Zachariassen, pápi Ingibjørg, var í leiðsluni í Norðoya Sparikassa í heili 57 ár*